Lagt til rættis: Inna Tärnroos

# Lat villdjórið vakna

Nei, vit sluppu ikki við skrekkinum. Leopardmynstrið fra 80-unum er enn einaferð heitari enn heitt.
Í vár kagar leopardmynstrið fram alla staðni, líka frá klæðum til prýði. So nú er bara at leita villu síðuna fram.. grrr...



*Alt er frá Hennes & Mauritz*

»Staycation» er tað nýggjasta nýggja í USA. Vegna fíggjarkreppuna hava fólk ikki ráð at ferðast. Tí er enska orðið vacation skift út við staycation. Sum orðið sigur, verður frítíðin brúkt heima í staðin fyri burturi.

# H&M Home hittar





Fyri umleið einum mánað síðani kom Hennes & Mauritz Home á marknaðin. Spenningurin hevur verið stórur, tí fyritøkan hevur leingi arbeitt við einum internethandli við tingum til heimið.
Hóast H&M Home bara fæst á netinum, eru tey, sum vit hava prátað við, sera væl nøgd við vørurnar, sum eru av rættiliga høgari góðsku, hóast tær eru bíligar. Litirnir eru næstan klárari í veruleikanum enn á myndunum á netinum.
Hvítt við grafiskum mynstrum, tøl og sentimeturmál ganga aftur, og kendi teknarin Liselotte Watkins hevur myndprýtt litfagra partin av kollektiónini, sum skiftir fýra ferðir árliga. Tíverri sendir H&M ikki vørur til Føroyar, men so er bara at gera sum vit á Rákinum: Bílegg til onkran, sum býr uttanlands, og bið tey taka vørurnar heim við ella senda tær upp við postinum.

# Hugo Boss til børn



Boss Orange Kids Collection eitur nýggja kollektiónin til børn millum 4 og 15 ár. Klæðini, sum eru inspirerað úr Afrika, eru rættiliga øðrvísi, í ljósum litum og úr besta tilfari. Les meira á www.hugoboss.com

*Fitt klæði til børn frá Hugo Boss*

# Sveima á gøtuni



*MBT-skógvar styrkir veddarnar í rumpuni, meðan tú gongur*

Um konan framman fyri teg sær út til at sveima, er hon helst í einum MBT-skóm ella stivlum. MBT stendur fyri Masai Barefoot Technology, sum er ein skógvur við rundum sóli. Umframt at bøta um kropsburðin, venur hann eisini rumpuna og beinini og styrkir liðirnar. Bílegg frá www.ergo.fo, sum sendir til alt landið.